# Vegleiðing til rundskriv
# um fráboðan og góðkenning
# av KT-skipanum

SOA

§

Varðveitsla

@

Fyriskipan



Skjal

## Formæli

Endamálið við hesari vegleiðing er at greiða frá og lýsa út í æsir rundskrivið um fráboðan og góðkenning av KT-skipanum. Í vegleiðingini er teksturin úr rundskrivinum settur upp við feitum og aftaná er ein vegleiðing, har krøvini verða lýst gjøllari, grundgivin og lýst við dømum.

Myndugleikin eigur tí at lesa vegleiðingina ígjøgnum áðrenn tey boða frá teirra skipanum. Á okkara heimasíðu [www.lss.fo](http://www.lss.fo) eru talgild oyðubløð til:

- Fráboðan av KT-skipanum (link)
- Góðkenning av KT-skipanum (link)

Her finnur tú eisini aðra vegleiðingr til rundskrivið eins og ein lista yvir skipanir, sum eru góðkendar eftir hesum rundskrivi.

Krøvini, ið eru stillað til góðkenning av skipanum, eru knýtt at formatkrøvunum til skjalasavns-útgávur av dátum (avrit av dátum). Tískil verður mælt til, at myndugleikin og tess veitari eisini kunna seg um Kunngerð/rundskriv um skjalasavnsútgávur eins og vegleiðingina.

Hendan vegleiðingin verður dagførd við jøvnum tíðarbilum. Vegleiðingin er seinast dagførd tann 4. juli 2016.

Hava tit spurningar viðv. rundskrivinum og vegleiðingini, kunnu tit venda tykkum til RoiE@savn.fo

# Innihald

Formæli ........ 1

Øki ........ 3

Fráboðan ........ 4

Varðveitsla og vraking ........ 6

Góðkenning ........ 8

Avmarking fyri góðkendar skipanir við skjølum ........ 9

Innrætting og rakstur av skipanum við skjølum ........ 15

Eftirlit og umsjón við góðkendum skipanum og skjølum ........ 24

## Øki

**§ 1**

**Ásetanirnar í hesum rundskrivinum eru galdandi fyri allar kommunalar myndugleikar og landsmyndugleikar í Føroyum (hereftir nevndir stovnar).**

**§ 2**

**Ásetingarnar í hesum rundskrivinum eru galdandi fyri KT-skipanir, ið verða nýttar til savnan og goymslu av upplýsingum, sum eru gjørdar ella fingnar til vega í sambandi við virksemi hjá einum stovni (talgilt fyrisitingartilfar).**

***Stk. 2.*** **Ein KT-skipan (hereftir nevnd skipan) skal skiljast sum ein skipanarlig goymsla av dátum, umframt møguliga eisini talgild skjøl hjá stovninum.**

Ásetingarnar fevna um allar skipanir, ið innihalda ella viðgerða dátur, og sum eru partar av fyrisitingini hjá myndugleikanum innan ábyrgdarøki tess, ella sum verða brúktar innanhýsis hjá myndugleikanum. Tað kann til dømis verða:

- ESDH/TMSH-skipanir, (Talgild, Máls og Skjala Handfaringarskipan)
- Tekniskipanir,
- Fakskipanir (dátugrunnar/skrásetanir)
- Hagfrøðilig dátusøvn, geodátuasøvn
- SOA-skipanir

**§ 3**

**Brúksøki fyri skipanir skulu, sum ásett í § 2, vera bólkað og avmarkað eftir evni.**

***Stk. 2.*** **Fyri skipanir við skjølum skulu hesi krøv haraftrat vera lokin:**

**1) tað skal verða ein greið skipanarlig og evnis-avmarking av teimum økjum, har brúkt verður ávikavist pappírskjalagoymsla og talgild skjalagoymsla**

**2) skifti frá pappírsgoymslu til talgilda skjalagoymslu skal vera galdandi fyri øll skjøl og mál innan fyri viðkomandi øki og skal fremjast sama dag.**

Í fráboðanarskjalinum skal vera tilskilað, hvør hevur skrivað inn í skipanina, og hvat skipanin verður brúkt til. Skipanin kann t.d. verða brúkt av ymiskum skrivstovum, einari ávísari deild, øllum myndugleikanum ella av fleiri myndugleikum.

Tað skal verða greitt, hvørji evni skipanin verður brúkt til: t.d. kanningararbeiði, studningsveitingar ella vanliga málsviðgerð.

*Fyri skipanir við skjølum*

Um so er, at bæði pappírarkivering og talgild arkivering verður brúkt, skal tað vera greitt sundurbýti av teimum økjum, har arkiverað verður á pappíri, og tey øki, har arkiverað verður talgilt burturav. Hettar kann gerast við atliti til bygnaðin á virkinum ella eftir evnum. Myndugleikin kann velja at fara yvir til talgilda skjalasavnsgoymslu við einari deild fyri og aðrari eftir, soleiðis at skipanin

verður tikin í nýtslu yvir eitt ásett tíðarskeið, ella tey kunnu velja, at ávísir máls-flokkar skulu verða verandi á pappíri, t.d. starvsfólkamál.

Myndugleikin kann **ikki** hava eina blandaða málsskipan, har tað í málunum skiftivís verða varðveitt pappírsskjøl og talgild skjøl..

Í sambandi við skifti til talgilda skjalagoymslu skal myndugleikin steðga við at leggja pappírsskjøl inn á pappírsmál, ið eru í gongd. Hereftir skulu skjøl og mál einans arkiverast talgilt. Nøkur mál verða "skorin" soleiðis, at fyrsti partur av málinum er á pappíri og annar partur talgildur. Mælt verður tí til, at umskifti til talgilda skjalagoymslu hendir í sambandi við tíðarskifti (journalperiodur).

Tá tað snýr seg um málsøki við pappírsskjalagoymslu, skulu øll skjøl verða varðveitt á pappíri, og tá tað snýr seg um málsøki við talgildari varðveiting, skulu øll skjøl verða goymd talgild burturav. Um so er, at nøkur skjøl, av tekniskum ávum, ikki kunnu skannast, kunnu tey verða goymd á pappíri. Tað skal tá tilskilast í skipanini, at hetta ávísa skjalið finnist á pappíri.

## Fráboðan

**§ 4.**
**Sum nevnt í § 2 skulu stovnar boða Landsskjalasavnið frá um nýggjar skipanir til seinast 3 mánaðir, áðrenn skipanin verður tikin í nýtslu.**
Hetta fyri at tryggja, at málsviðgerðin hjá Landsskjalasavninum kann verða lokin, áðrenn skipanin verður tikin í nýtslu.

**§ 5.**
**Fyri skipanir, sum longu eru góðkendar, skal bert boðast frá, táið munandi broytingar henda, herundir**

1) **Broyting í skrásetanarskipanini við skjølum**
2) **Munandi broytingar av nýtsluøkinum hjá skipanini, so sum ábyrgdarbroytingar/ressortbroytingar í fyrisitingini**
3) **Munandi broytingar í skrásetingarbygnaðinum og innihaldi í skipanum við skjølum**
4) **Heila ella partvísa yvirgongd til talgilda arkivering/skráseting av skjølum**

Um so er, at tað verða gjørdar broytingar í skipanini, sum Landsskjalasavnið longu hevur góðkent, skal tað í ávísum førum fráboðast aftur. Fráboðast skal aftur, *um so er* at gjørdar verða broytingar upp á mátan ein leitar og finnur skjøl upp á, *og um so er*, at tað verða skrásett nýggj sløg av upplýsingum, ella *um so er*, at tað verða skrásett fleiri málsøki enn tey, skipanin var ætlað til tá ið hon varð tikin í nýtslu.

Við skrásetingarsamskipanini (registreringssystematikken) meinast við ta skipaðu evnisuppdeilingina av málunum í sniði, t.d. einum journalplani, indexfrøðiorði (indextermer), evniorði ella fasettum.

- Um so er, at skrásetingarsystematikkurin er grundaður á, hvørjar skrivstovur skapa skjølini og tað síðani verður broytt upp á uppgávubýtingina millum ella samansetingina av

skrivstovunum, skal tað nýggja skrivstovu- og málsbýtið greiðast frá í einari fráboðan, somuleiðis hvussu myndugleikin tryggjar sær, at tey eldru málini kunnu finnast fram aftur.

- Um so er, at ein myndugleiki fær nýggjar uppgávur at røkja í sambandi við t.d. eina ressortbroyting, og hesar uppgávur skulu skrásetast í einari skipan, sum longu er virkin, skal boðastfrá, hvussu tær nýggju uppgávurnar skulu skrásetast í skipanini.
- Um so er, at ein myndugleiki mitt í einum journaltíðarskeiði byrjar at goyma talgildug skjøl í einari skipan, sum í upprunaligu fráboðanini ikki skuldi innihalda skjøl, skal hettar fráboðast Landsskjaladavninum. Greiðast skal frá hvørji skjøl skulu goymast í skipanini og eisini hvussu hesi skulu skrásetast.
- Um so er, at ein myndugleiki broytir skrásetingarsystematikkin í journalætlanini til ein "fasetplan", skal broytingin boðast frá, tó ikki, um so er at at tað bert verða einir tveir nýggir málsbólkar skoyttir upp í.

**§ 6.**
**Skipanir, sum skulu brúkast av fleiri myndugleikum, skal fráboðast av tí myndugleikanum, sum stendur fyri íverksetan, menning og viðlíkahald av skipanunum.**

***Stk. 2.*** **Í sambandi við fráboðan av skipanum, sum nevnt í stk. 1, skal ásetast, hvørjir myndugleikar hava ábyrgdina av røktanini av økinum viðvíkjandi skjalasavnindum, herundir avhendan til Landsskjalasavnið.**

Um so er, at fleiri myndugleikar eru felags um eina skipan, skal tann myndugleikin fráboða, sum hevur ábyrgd av at seta skipanina í verk, viðlíkahalda og røkta. Tað er eisini galdandi, um so er, at fleiri deildir/skrivstovur undir einum stjórnarráði brúka somu ESDH-skipan/TMSH-skipan, sum eina sokallaða samtaks-loysn. So skal tann myndugleikin, har skipanin er sett í verk, boða frá hesum.

**§ 7.**
**Landsmyndugleikar skulu boða Landsskjalasavninum frá skipanum, sum verða brúktar bæði av lands- og kommunalum myndugleikum/stovnum.**

**Stk. 2. Skipanir, har ein landsmyndugleiki hevur fyrisitingarligan myndugleika og/ella hevur dátuábyrgd av skipanini, skal boða frá til Landsskjalasavnið eftir teimum reglum, sum eru ásettar í hesum rundskrivi.**

Um so er at lands- og kommunalmyndugleikar brúka somu skipan, skal landsmyndugleikin boða frá skipanini. Tað kann t.d. vera ein dátugrunnur, sum allar kommunur skráseta í ella geva frágreiðing til, men har tað er landsmyndugleikin, sum hevur fyriskipanarligan myndugleika fyri dátugrunninum og stendur við dátumyndugleikaábyrgdini. Tá er tað landsmyndugleikin sum hevur ábyrgd av at boða frá dátugrunninum. Fráboðanin skal fylgja reglunum í hesum rundskrivi.

**§ 8.**
**Fráboðan skal gerast við fráboðanarskemanum hjá Landsskjalasavninum.**

**Stk. 2. Í fráboðanini skal viðleggjast verandi skjalfestan, herundir tabell- og kolonnulýsingar, møguliga í form av einum uppkasti.**

Á heimasíðuni hjá Landsskjalasavninum er eitt talgilt skema, sum skal brúkast til fráboðan um nýggjar skipanir. Verandi umráðandi teknisk skjalfestan av skipanini skal sendast við til nýtslu í samband við viðgerðina av fráboðani. Teknisk skjalfestan kann t.d. verða lýsing av mannagongdum, tabell- og feltlýsingum, E/R-diagrammir, konverteringslýsingar, kravásetingar o.a. Fyri skipanir við skjølum kann eitt uppskot um reglugerð til skipanina eisini sendast við.

**§ 9.**

**Myndugleikin skal, sum nevnt í § 1, boða frá afturlítandi skanning og talgildum varðveitingarverdum samgildum/analogum savnindum um so er, at tey samgildu savnindini ynskjast burturbeind eftir at verða gjørd talgild.**

**Stk. 2. Fráboðan um talgild savnindi, sum nevnt í stk. 1 skulu gerast við fráboðanar-oyðublaðnum hjá Landsskjalasavninum.**

**Stk. 3. Fráboðanin skal sendast Landsskjalasavninum, áðrenn talgildingin byrjar.**

Um so er at ein myndugleiki ynskir at talgilda eitt pappírsskjalasavn, sum Landsskjalasavnið hevur avgjørt at varðveita, skal hetta fráboðast Landsskjalasavninum, áðrenn skanningin verður sett í gongd. Skipanin, sum tey skannaðu skjølini skulu goymast í, skulu fylgja ávísingunum í hesum rundskrivi.

Skanningin skal bert fráboðast, um so er, at myndugleikin ætlar at burturbeina pappírs-skjalasavnið aftaná, at tað er skannað. Fráboðanin skal gerast á oyðublaðnum, sum finst á heimasíðuni hjá Landsskjalasavninum.

## Varðveitsla og vraking

**§ 10.**

**Í sambandi við fráboðan tekur Landsskjalasavnið avgerð um, hvørt innihaldið í skipanini skal varðveitast ella vrakast.**

***Stk. 2.*** **Í skipanum við skjølum kann myndugleikin biðja Landsskjalasavnið gera eina fyribils vrakingarmeting av talgildum skjølum, tá ið skipanin verður tikin í nýtslu.**

Tá skipanir verða fráboðaðar, ger Landsskjalasavnið eina meting av, um dátur og skjøl í skipanini skulu goymast ella vrakast:

- Varðveitsla av dátum merkir, at tað eftir 5 árum skal avhendast ein skjalasavnsútgáva (avrit av dátum í ávísum formati) til Landsskjalasavnið. Striking av dátum í skipanini má ikki koma fyri, áðrenn skjalasavnsútgávan er góðkend av Landsskjalasavninum.

Tað skal soleiðis arkiverast, áðrenn ein ger vrakingar í skipanini. Skipanin skal í sambandi við størri broytingar endurfráboðast Landsskjalasavninum. Í sambandi við avhendan skal dátuinnihaldið og bygnaðurin í skipanini skjalfestast.

- Vraking av dátum í einari skipan meinast við, at myndugleikin ikki skal avhenda dátur til Landsskjalasavnið og harvið frítt kann sletta dátur, tá tað eftir myndugleikans meting ikki longur er rættarliga ella fyrisitingarliga brúk fyri teimum longur.

Í sambandi við meting av varðveitingarvirði í dátum, leggur Landsskjalasavnið áherðslu á:

- Um dátur kunnu endurnýtast, tvs. um dátur kunnu skoytast saman við dátum frá øðrum skipanum.
- Teir persónar, sum dátur umfata: Er tað til dømis skráseting av øllum føroyingum ella bara ein lítil tilvildarligur partur.
- Um dátur eru umboðandi. T.d. um dátur kunnu sigast at vera umboðandi fyri tað serstaka virksemið.
- Um upplýsingar kunnu metast at hava søguligt virði.

Haraftrat kunnu búskaparligar metingar vera viðvirkandi til at avgera, hvussu dátur skulu goymast. Eftir endaliga meting gevur Landsskjalasavnið boð um áseting um goymslu ella vraking. Ásetingin verður send myndugleikanum, og verður eisini almannakunngjørd á heimasíðu Landsskjala-savnsins.

*Vraking av skjølum í KT-skipanum*
Um so er, at ein myndugleiki ynskir at vraka skjøl í einari skipan, skal hann senda eina umbøn um hetta saman við sjálvari fráboðanini. Umbønin skal innihalda eina lýsing av teimum málum/skjølum, sum ynski er um at vraka, eisini hvussu rúgvismikið tilfarið væntast at verða.

Fyri at vraking av skjølum í skipanum skal loysa seg, skal talan vera um stóra mongd av skjølum, sum eru løtt at finna fram og skilja út úr. Vraking av skjølum kann t.d. vera týðandi, í einari skipan, har stórar mongdir av standardbrøvum verða útskrivaðar, og har allir upplýsingar liggja í dátugrunnum og verða drignir út til brøvini. Hesi brøv eru ikki neyðug at arkivera, um so er, at sendingin av teimum er skjalfest.

**§ 11.**
**Skipanir, hvørs innihald er avgjørt til at verða vrakað, skulu ikki góðkennast av Landsskjalasavninum.**
Tað eru bert skipanir, sum Landsskjalasavnið hevur tikið avgerð um at varðveita, sum skulu góðkennast. Landsskjalasavnið góðkennir ikki skipanir, sum avgerð er tikin um at vraka .

**§ 12.**
**Vraking av analogum/samgildum savnindum, ið eru verd at varðveita, má ikki henda, fyrr enn góðkenning frá Landsskjalasavninum fyriliggur. Hesi skulu skannast ella á ein ella annan hátt talgildast, sbrt. § 9, áðrenn vraking kann fara fram.**

Um so er, at ein myndugleiki hevur talgilt/skannað varðveitingarverd pappírsavnindi, mugu tey ikki vrakast fyrr enn Landsskjalasavnið hevur góðkent talgildingina. Galdandi leiðreglar um varðveiting og vraking av pappírsavnindum kunnu síggjast á heimasíðuni hjá Landsskjalasavninum.

## Góðkenning

**§ 13.**

**Skipanir, hvørs innihald er ætlað til savnindi, sbrt. § 10, skulu góðkennast av Landsskjala-savninum.**

Allar skipanir, ið Landsskjalasavnið hevur tikið avgerð um at varðveita, skulu eisini góðkennast.

**§ 14.**

**Í sambandi við góðkenning skal myndugleikin veita nøktandi skjalfesting, um so er, at hon ikki longu varð send saman við fráboðanini.**

***Stk. 2.*Við nøktandi skjalfesting meinast:**

1) **Tøknilig skjalfesting sum tabel- og kolonnulýsing; E/R-diagram og skjalfesting av at framleiðast kann ein skjalasavnsútgáva í einum relationellum formi**
2) **Fyri skipanir við skjølum: uppkast til leiðbeining fyri nýtslu av skipanini samb. § 28.**

**Stk.3. Landsskjalasavnið kann stilla krøv til format og til góðsku av skjalfestan**

Áðrenn ein skipan kann góðkennast skal Landsskjalasavnið hava nøktandi upplýsingar um dátubygna og mynduleikans nýtslu av skipanini,.

Nøktandi upplýsingar eru lýsingar av tabellum/kolonnum í skipanini, og hvat tær innihalda, og hvussu tabellirnar eru knýttar saman við hvørja aðra í formi av einum E/R-diagrammi. Haraftrat skal myndugleikin greiða frá, hvussu dátur í skipanini kunnu konverterast/umskapast til eina skjalasavnsútgávu sambært rundskrivi um KT-avhendan av skjalasavnsútgávu til Landsskjala-savnið. Rund-skrivið finst á www.skjalasavn.fo. Frágreiðingin skal innihalda eitt uppskot til innihald av skjalasavnsútgávum t.d. í sniði av einum ER-diagrammi. Fyri skipanir við goymslu av skjølum skal tað harumframt latast inn leiðreglar fyri nýtslu av skipanini. Endamálið við leiðreglum og innihaldi er lýst niðanfyri undir § 28.

**§ 15.**

**Fyri skipanir, sum verða settar í verk á sama hátt hjá fleiri myndugleikum, kann tann neyðuga tøkniliga skjalfestanin, sum nevnd í § 14, stk. 2, nr. 1 avloysast við einari tilvísing til góðkenda íverksetan saman við lýsing av frávikum.**

**Stk. 2. Landsskjalasavnið ger og almannakunngerð eina skrá yvir skipanir, ið sbrt. stk. 1 kunnu fáa frávik frá ymiskum skjalprógvingarkrøvum.**

Um so er, at skipanin verður sett í verk sum ein standardútgáva av einari skipan, sum Landsskjala-savnið áður hevur góðkent, er ikki neyðugt at senda tekniska skjalfestan. Men um so er, at gjørdar verða sertillagingar av skipanini, ella um so er, at tað er ein útgáva, ið ikki fyrr er fráboðað, skal skjalfestan sendast til Landsskjalasavnið.

Á www.skjalasavn.fo kemur ein listi yvir tær skipanir, sum eru góðkendar eftir hesum rundskrivi. Fyri skipanir á listanum er ikki neyðugt at senda inn tekniska skjalfestan.

Myndugleikin skal tó verða varugur við, at tá skipanir skulu varðveitast, skal tann tekniska skjalfestanin vera partur av skjalasavnsútgávuni. Tað er ábyrgdin hjá myndugleikanum at útvega ta neyðugu teknisku skjalfestanina til nýtslu í sambandi við varðveitslu.

**§ 16.**

**Um so er, at ein skipan er tikin í nýtslu, áðrenn Landsskjalasavnið hevur góðkent hana, kann Landsskjalasavnið krevja, at myndugleikin ger ymiskar neyðugar broytingar í innrættingini og rakstrinum við atliti til varðveiting.**

Um so er, at ein myndugleiki tekur eina skipan í nýtslu, áðrenn Landsskjalasavnið hevur góðkent hana, kann Landsskjalasavnið stilla krøv um, at myndugleikin ger tillagingar í skipanini fyri at tryggja eina nøktandi varðveitslu av dáta í skipanini. Tað kann t.d. vera skráseting av kravdum upplýsingum um mál og skjøl, sum skulu leggjast aftrat og skrásetast afturlítandi.

## Avmarking fyri góðkendar skipanir við skjølum

**§ 17.**

**Skipanir við talgildum skrásetingum av upplýsingum um mál og skjøl, við goymslu av málum og skjølum á pappíri (e-journalir) skulu deilast upp í tíðarskeið á umleið 5 ár, møguliga við einari tillagingartíð upp til 6 mánaðir.**

Skipanir, sum verða nýttar til at leita eftir pappírskjølum (sokallaðar e-journalir ella journal-skipanir), skulu latast aftur/lokast 5. hvørt ár. Hettar merkir, at øll mál og skrásetingar av teimum skulu lokast. Mál, sum myndugleikin framhaldandi hevur brúk fyri at kunna skráseta skjøl í, verða stovnað í einum tómum dátugrunni við nýggjum málsnummari. Mál verða knýtt at skrásetingar-skipan fyri eina nýggjum tíðarskeiði. Hettar kallast tíðarskifti.

Endamálið við tíðarskifti er at deila pappírssavnindini upp í tíðarskeið/partar, sum kunnu avhendast Landsskjalasavninum, tá pappírsmálini eru 30 ára gomul. Tó skal eisini avhendast ein skjalasavns-útgáva av e-journalini beint eftir tillagingartíðarskeiðið/tíðarskifti. Hetta fyri at tryggja, at dátur og skjalfesting ikki verður mist við tøkniligari fyrning, broyting til eina nýggja skipan, broyting í ressort/ábyrgdarøki osv.

Myndugleikin kann velja at hava eina tillagingartíð, har mál, ið eru í gongd, kunnu viðgerast liðugt í gomlu skipanini, og nýggj mál, sum verða stovnað, verða reist í nýggju skipanini. Tillagingartíðin má ikki verða longri enn eitt ½ ár, tí tann gamla skipanin skal kunna latast aftur innanfyri rímiliga tíð.

**§ 18.**

**Skipanir við talgildari skráseting av upplýsingum um mál og skjøl, umframt goymslu av málum og skjølum í talgildum formi, verða avmarkaðar á ein av fylgjandi háttum í mun til avhending av skjalasavnsútgávum til Landsskjalasavnið:**

**A: Avmarkað tíðarskeið á uml. 5 ár við tíðarskifti**

**B: Løtumynd umleið hvørt 5. ár av øllum málum og skjølum, sum ikki fyrr eru avhendað, somuleiðis allar metadátur frá tíðini, ið skipanin hevur verið til.**

**C: Avhending av loknum málum hvørt 5. ár og allar metadátur frá livitíðini hjá skipanini.**

**Stk. 2. Við tíðarskifti skilst, at skrásetingarparturin av skipanini og øll mál verða afturlatin. Mál, ið ikki eru liðug viðgjørd, verða endurstovnað í einum nýggjum tíðarskeiði, møguliga eftir eina umskaringstíð upp til 6 mánaðar.**

Sí vegleiðingartekstin undir § 20.

**§ 19.**

**Avmarking av skjalasavnsútgávu sambært pkt. B ella C er treytað av, at Landsskjalasavnið eftir endaligt eftirlit, sbrt. § 31, gevur loyvi til tess.**

***Stk. 2.* Landsskjalasavnið kann eftir endaligt eftirlit áleggja myndugleikanum at avmarka skipanir við skjølum við heimild í pkt. A.**

Sí vegleiðingartekstin undir § 20

**§ 20**

**Avmarking við heimild í pkt. C er treytað av, at myndugleikin broytir skjøl, sum hava verið skrásett í skipanini í meiri enn 5 ár til eitt skjalasavnsformat.**

Skipanir við fullari talgildari skráseting og goymslu av skjølum/fílum (td. ESDH/TMSH-skipanir) kunnu varðveitast á trimum ymiskum frymlum. Frymlarnir hava hvør sínar fyritreytir, fyrimunir og vansar. Landsskjalasavnið ásetur, í samráð við myndugleikan og aftaná eftirlit við skipanini, eftir hvørjum frymli varðveitingin skal fara fram. Frymilin er soleiðis treytaður deils av hvørji sløg av málum myndugleikin brúkar, deils av hvussu skipanin verður brúkt.

Myndugleikin skal lýsa í teirra vegleiðing, hvat fyri varðveitingarfrymil tey ynskja at miða ímóti.

**A: Tíðarskifti við á leið 5 ára millumbilum**

Tíðarskifti meinast við, at øll mál og skráseting í málum skulu lokast og enda. Mál, sum myndugleikin framhaldandi hevur brúk fyri at kunnu skráseta skjøl í, verða stovnað í ein tóman dátugrunn við nýggjum málsnummari.

Lokað mál og skjøl kunnu flytast til tann nýggja dátugrunnin, men tey skulu merkjast, soleiðis at tey ikki eru partur av skjalasavnsútgávuni í nýggja tíðarskeiðinum. Tað vil siga, at tey kunnu flytast yvir sum kunningartilfar.

Myndugleikin kann eisini velja at brúka eina tillagingartíð í sambandi við skifti til eitt nýtt tíðarskeið. Tað merkir, at mál, ið eru í gongd, skulu lokast í tí gamla tíðarskeiðinum, meðan mál, sum byrja, verða stovnað í nýggja tíðarskeiðinum. Tilllagingartíðarskeiðið má hægst verða 6

mánaðir. Hereftir verður gamla tíðarskeiði lokað heilt og møgulig mál, ið eru í gongd verða lokað og stovnað í nýggjum tíðarskeiði.

### Frymil A fyri arkivering/varðveitslu av einari skipan við skjølum við tíðarskifti (uttan tillagingartíð)

**1. skjalasavnsútgáva**

2015 2020 2025 2030

Skrásetingardátur, 2015-2020

Skjøl frá tíðarskeiðinum

**2. skjalasavnsútgáva**

Skrásetingardátur, 2020-2025

Skjøl frá tíðarskeiðinum 2020-2025

**3. skjalasavnsútgáva**

Skrásetingardátur, 2025-2030

Skjøl frá tíðarskeiðinum 2025-2030

Fyrimunir við at gera tíðarskifti í skipanini er:

- At tað gevur møguleika at skifta til nýggjan skrásetanar skipan og at tillaga aðrar metadátur. Hóskar systematikkurin/kervisskipanin og metadáta í veruleikanum til tær uppgávur, sum myndugleikin hevur nú?
- At fáa ruddað upp í skipanini, bæðihvat viðvíkur málum/skjølum, eins og organisatoriskum/-skipanarligum broytingum, sum eru hendar síðan seinasta tíðarskifti.
- At umhugsa um alt, sum eigur av vera skrásett/goymt, í veruleikanum er komið í skipanina.
- At tryggja, at mál ikki eru í gongd (opin) so leingi, at tað hevur við sær trupulleikar við skjalakonverteringini/skjalabroytingini í sambandi við arkivering.
- At fara yvir til eina nýggja skipan, uttan at tað er neyðugt at gera konverteringar/broytingar.
- Tað er innbygt í modellið, at arkiveringin av skjølum hendir hvørt fimta ár.

*Vansar við tíðarskifti*

- At øll mál skulu lokast. Tað kunnu vera mál, sum ikki eru gagnlig at loka vegna sera lang máls- og verkætlanartíðarskeið.
- Tað kann verða dýrt at skula loka og endurstovna mál, um so er at myndugleikin hevur nógv opin mál.
- Koplingin til aðrar (fak)skipanir kann geva trupulleikar við at loka skipanir.

*Fortreyt/treyt*

- Tað skal vera ávísing millum endurstovnað mál, í nýggja og gamla tíðarskeiðinum eftir lokan.
- Myndugleikarnir kunnu altíð velja at gera tíðarskifti í teirra skipanum. Myndilin krevur ikki eina serstaka góðkenning hjá Landsskjalasavninum.

**B: Støðumynd uml. 5 hvørt ár.**

Tá ein  støðumynd av einari skipan við skrásetingum og goyming av talgildum skjølum v.m. skal arkiverast, skal myndugleikin avtala eina tíð við Landsskjalasavnið um, nær dátur og skjøl skulu dragast út til eina skjalasavnsútgávu. Skipanin heldur áfram eftir arkiveringina. Tað skal arkiverast umleið eina ferð hvørt 5. hvørt ár.

Í skjalasavnsúrdráttinum skulu vera allar metadátur um øll mál og skjøl, sum eru framleidd frá tá skipanin byrjaði sítt virksemi og skjøl, sum eru goymd í skipanini síðani seinastu arkivering. Við fyrstu arkivering verða øll skjøl tikin við.

## Frymil B – fyri arkivering/varðveitslu av einari skipan við skjølum sum løtumynd




*Fyrimunir við at avhenda løtumynd*

- Arkiveringin kann fara fram, uttan at brúkarar av skipanini leggja merki til tað. Tá skulu ikki lokast/endurstovnast mál.
- Eingin trupulleiki við samanrenning við aðrar skipanir.
- Tað er bygt inn í frymlin, at avhendanin av skjølum fer fram hvørt fimta ár, so konvertering/broyting skal bert gerast í sambandi við avhendan.

*Vansar við at avhenda løtumynd*

- Tað skal ikki ruddast upp í skipanini.
- Tað er ikki møguligt at gera størri broytingar hvørki í skipanini av arbeiðinum ella skrásetanarsystematikkinum og metadátum.
- Við skifti til eina nýggja skipan skulu gerast konverteringar/broytingar av dátum. Landsskjalasavnið skal góðkenna konverteringslýsingina, áðrenn konverteringin verður framd.
- Skrásetingarparturin av skipanini skal avhendast fyri alt tíðarskeiðið,  soleiðis at skilja,  at avhendast skulu dátur, sum fyrr er avhendar.

*Fortreyt/treyt*

Myndilin/frymilin er treytaður av, at Landsskjalasavnið aftaná endað eftirlit góðtekur, at hesin frymilin verður valdur. Tá arkiverað er eina ferð eftir hesum myndlinum, kann eftirfylgjandi bert arkiverast eftir hesum frymlinum/myndlinum ella myndli/frymil A (tíðarskifti).

Fortreytin fyri góðkenning at nýta støðumynd sum arkiveringsfrymil er, at Landsskjalasavnið metir, at skipanin er brúkt í samsvari við leiðreglurnar, sum vórðu góðkendar í sambandi við fráboðan av skipanini.

Tað eru bert skipanir, sum eru góðkendar eftir hesum rundskrivinum, sum kunnu avhenda eftir myndli/frymli B.

**C: Avhending av loknum málum**

Frymilin gongur út upp á, at myndugleikin avhendir tey mál, sum eru lokað innan fyri tey seinastu 5 árini, haraftrat metadáturnar frá tíðini, har skipanin hevur verið virkin.

**Frymil C- avhending av lokaðum málum**




*Fyrimunir av at avhenda lokað mál:*

- Avhendanin kann gerast, uttan at brúkarin av skipanini varnast hettar.
- Heilar málsgongdir verða avhendar .
- Eingir trupulleikar av reltatiónum/samangreiping við aðrar skipanir.

*Vansar av at avhenda lokað mál:*

- Tað verður ikki ruddað upp í skipanini.
- Tað er ikki møguligt at gera størri broytingar hvørki í samskipanini av arbeiðinum ella í skrásetingarsystematikkinum/kervinum.
- Tað skal tryggjast, at endað mál verða lokað so hvørt.
- Tað er ikki bygt inn í skipanina at skjøl arkiverast og avhendast eftir fimm árum. Myndugleikin skal í sínum leiðreglum til skipanina lýsa, hvussu konverteringin/broytingin skal henda.

- Í samband við skifti til nýggja skipan fer fram ein formbroyting av dátum. Landsskjalasavnið skal góðkenna lýsingina av háttinum, áðrenn formbroytingin verður framd.
- Skrásetingarparturin av skipanini skal avhendast fyri alt tíðarskeiðið, sum merkir, at avhendast skulu dátur, sum eru avhendar áður.

*Fortreyt/treyt:*

Frymilin er treytaður av, at Landsskjalasavnið, eftir at eftirlitið er gjørt, góðkennir, at hesin frymilin/myndilin verður brúktur. Tá tað einaferð er avhendað eftir hesum frymlinum, kann eftirfylgjandi bara avhendast eftir hesum frymli ella eftir frymli A (tíðarskifti).

Fortreytin fyri, at lokað mál kunnu verða avhend er, at Landsskjalasavnið frammanundan ger meting av, um skipanin hevur verið brúkt í samasvari við tær góðkendu leiðreglurnar í fráboðanini av skipanini, herundir at mál eru vorðin lokað so hvørt tey eru enda.

Tað er bert skipanir, sum eru góðkendar eftir hesum rundskrivi, sum kunnu avhenda eftir frymli C.

Haraftrat er tað eitt krav, at øll skjøl, sum eru í skipanini í meiri enn fimm ár, konverterast/umskapast til skjalasavnssniðið. Tað er eisini galdandi fyri skjøl, sum eru í opnum málum. Tey formbroyttu skjølini verða goymd í skipanini, til alt málið er lokað og goymt.

Tað kann verða ymikir hættir fyri at tryggja konvertering:

- Tað verður gjørd ein formbroyting av øllum skjølum, beinanvegin tey eru stovnað í skipanini
- Tað verður gjørd ein mannagongd í skipanini, sum leypandi framfinnur skjøl, sum eru yvir 5 ár, og konverterar tey.
- Øll skjøl í skipanini verða formbroytt hvørt fimta ár, men bert skjøl í lokaðum málum verða avhend.

Tað skal lýsast í leiðreglunum til skipanina, hvussu formbroytingin skal fara fram, um so er, at ynski er um at brúka frymil C.

Legg merki til, at skipanir **uttan** goyming av skjølum verður ásettur frymil fyri avhending í samband við ásetan av varðveitsluásetan. Hesar skipanir verða varðveittar antin sum endað tíðarskeið (til dømis framleiðsla av skjalasavnsútgávum grundað á rokniskaparár) ella løtumyndir av dátum. Samstundis verður ásett, hvussu ofta dátur frá skipanini verða varðveittar.

**§ 21**

**Týðandi broytingar í einari skipan, ið er góðkend, eru treytaðar av, at framt verður eitt tíðarskifti, og at skjalasavnsútgávan verður avhendað, áðrenn broytingarnar verða gjørdar.**

***Stk. 2*** **Landsskjalasavnið tekur, eftir at hava móttikið fráboðan um broytingar, sbrt. § 6, avgerð um, hvørt broytingarnar føra við sær krav um tíðarskifti.**

> Myndugleikin skal boða Landsskjalasavninum frá munandi broytingum í teirra skipanum, tá broytingarnar kunnu hava við sær, at grundarlagið undir góðkenningini av skjalasavninum broytist.

Dømi upp á broytingar, sum altíð skulu fráboðast, kunnu vera:

- Skifti til aðra skrásetingarskipan, um so er at myndugleikin t.d. vil fara frá journalplani til ein sokallaðan fasetplan.
- Konvertering til eina nýggja skipan.

Landsskjalasavnið kann áleggja myndugleikunum at gera eitt tíðarskifti í skipanini, um mett verður, at broytingarnar eru so umfatandi, at tað fer at hava stóra ávirkan á nýtsluna og varðveitingina av skipanini.

## Innrætting og rakstur av skipanum við skjølum

**§ 22**

**Í einari skipan við skjølum skal hvørt skjal knýtast í eitt mál, hetta fyri at tryggja at øll skjøl, ið hoyra saman í einari málsgongd, altíð og skjótt kunnu finnast fram .**

> ***Stk. 2.*** **Landsskjalasavnið kann gera undantak frá kravinum í stk. 1.**

Øll skjøl í einari skipan við skjølum skulu knýtast í eitt mál, soleiðis at samhoyrandi skjøl lætt kunnu finnast fram.

Tað meinast tó ikki við, at øll skjøl í einum máli neyturviliga skulu journaliserast. Skjøl kunnu eisini leggjast í eitt mál til kunningar. Tað kann til dømis vera kunningartilfar, sum er hent at hava í málsviðgerini, men sum ikki er lógásett at journalisera, sbrt. lóg um alment innlit ella fyrisitingar-lógina. Alt tilfar, sum verður journaliserað sum ójournaliserað (lagt í málið, men ikki journaliserað), eru arkivaliir, og mugu ikki vrakast uttan loyvi frá Landsskjalasavninum.

Í nøkrum ESDH/TMSH-skipanum kunnu skjøl goymast uttan tilknýti til eitt mál. Tað kunnu vera fleiri skjøl í hesum skipanum, sum ikki eru tengd at málum. Tað ger tað sera torført at finna viðkomandi skjøl fram, ið skulu brúkast aftur, t.d. í sambandi við málsviðgerð. Tí skulu myndugleikarnir tryggja sær, at skjøl ikki eru í skipanunum, sum ikki eru knýtt í mál. Í sambandi við eftirlitið hjá Landsskjalasavninum við skipanum aftaná á leið 2 ára rakstur, skal myndugleikin upplýsa, hvussu nógv skjøl eru í skipanini, sum ikki eru knýtt at málum.

Tað kunnu verða skipanir við skjølum, har tað ikki gevur meining at hava eitt málshugtak, tí at skipanin sum so er at meta sum eitt stórt mál. Tað kunnu t.d. vera tekniskipanir, GIS-skipanir við skjølum knýttar til eitt ávíst stað, projektskipanir ella líknandi. Landsskjalasavnið kann í hesum førum síggja burtur frá, um mál eru stovnað í skipanini.

**§23**

Tað skulu, í hvørjum máli, skrásetast upplýsingar, sum gera tað møguligt at eyðmerkja og finna tey fram, so sum

1) Málseyðkenni
2) Málsheiti
3) Evni frá skipanarliga bygdari skrá, sum lýsir alla skipanina eftir ábyrgdarhavandi málsøkjum (skrásetingarsystematikkur).

Í skipanum við málum skulu, í hvørjum einstøkum máli, skrásetast upplýsingar, sum gera tað lætt fyri brúkararnar at finna mál fram.

*Málseyðmerking*

Málseyðmerking er journalnummarið/raðnummarið í málinum, og kann vera bygt upp á ymiskar mátar, til dømis:

- Ár + raðnummar
- Raðnummar
- Málsbólkur + raðnummar

Málseyðmerking skal vera unik fyri hvønn dag. Í flestu skipanum verður nummarið gjørt sjálvirkandi.

*Málsheiti*

Tilskilast skal eitt málsheiti, sum (stutt) lýsir hvat innihaldið í málinum er. Tað er eitt gott hugskot, í leiðreglunum fyri skipanina, at tilskila hvussu málsheiti skal skrivast, soleiðis at tað er ein einsháttað navngeving í skipanini. Tað ger tað lættari fyri brúkarar at leita eftir málum upp á tvørs í skipanini. Tað kann verða reglar fyri nýtslu fyri at brúka navnaorð og sagnorð í heitinum, eins og tað eisini kann verða ein verulig matrisa fyri, hvussu eitt mál skal kallast.

Matrix:
Myndugleikanavn, skipanarnavn, tíðarkonto

Málsheiti tilskila við hjálp av matrix:
Heilsufrøðiliga Starvsstovan, Kap 5. góðkenningar, 1.89

*Skrástanarsystematikkur*
Harumframt skal skrásetast eitt málsevni út frá einari skipanarligari uppbygdari skrá, sum umfatar skipanina eftir evnum/ábyrgdum á økinum. Tað kann verða ein journalætlan, ein fasetætlan, ein evnisorðalisti ella líknandi.

Systematikkurin skal tryggja, at myndugleikin lætt og skjótt kann leita mál fram út frá innihaldseyðkenni. Tað hevur týdning tá:

- nýggir brúkarar skulu leita í skipanini, t.d. nýggj starvsfólk ella brúkarar frá øðrum deildum? hjá myndugleikanum
- tað henda ábyrgdarbroytingar/ressortbroytingar og mál skulu finnast fram og flytast til aðrar myndugleikar.
- tá myndugleikin skal finna mál fram fyri at kunna svara fyrispurningum.

- tá skipanin er avhend til Landsskjalasavnið, og skjalasavnsbrúkararnir (ella myndugleikin sjálvur) skal finna mál fram um 10, 20 ella 50 ár.

Tað verður ikki tilmælt at brúka myndugleikabygnaðin herundir uppdeiling sum lýsing av evni fyri ábyrgdarøki/ressortøki. Hettar skyldast, at virkisskipanir ofta broytast, málsøkir verða flutt, og nøvnini fyri tær einstaku deildirnar, skrivstovurnar v.m. broytast . Tí verður ein lýsing, ið er bygd á virkisskipanina/organisatiónina skjótt ov gomul.

Umframt at leita eftir heitinum á evnum kann myndugleikin eisini nýta frítekstleiting. Tað skal lýsast í leiðreglunum fyri skipanina hjá myndugleikanum, hvussu málsupplýsingarnar verða skrásettar í skipanini.

**§ 24.**

**Fyri hvørt skjal skulu skrásetast upplýsingar, sum eyðmerkja skjalið og gera tað møguligt at og finna skjalið aftur, herundir**

1) **Skjalanavn**
2) **Skjaladagfesting**
3) **Fyri inn- og útgangandi brøv: avsendari/móttakari**
4) **Goymsluháttur**
5) **Tilknýti til mál.**

*Stk. 2.* **Hvørt skjal skal hava eitt serstakt ID, og tilknýti millum skjølini skal skrásetast.**

*Stk. 3.* **Um so er, at tilknýtið millum skjøl, sum nevnd eru í stk. 2, ikki beinleiðis er íverksett í skipanini, skal myndugleikin í sambandi við fráboðanina greiða frá, hvussu tilknýtið verður skrásett í skjalasavnsútgávuni.**

*Stk. 4.* **Landsskjalasavnið kann víkja frá krøvunum í stk. 1.**

Skjøl skulu knýtast í mál, men haraftrat skulu skrásetast nakrir grundupplýsingar um hvørt skjal, soleiðis at tað er lætt at eyðmerkja.

*Skjalaheiti*
Tað hevur týdning, at eitt skjal hevur eitt stutt, sigandi heiti, sum lýsir innihaldið í skjalinum. Nógv skjøl koma við e-posti og e-postur ferðast millum fólk fleiri ferðir. Tað hevur við sær, at ein ofta sær skjøl við einsljóðandi heitum í ESDH/EMSH-skipanum, við tað skjalaheiti verða tikin sjálvirkandi frá evnisfeltinum á e-postinum. Tað kann tískil verða neyðugt at broyta heiti á e-postinum, tá hann verður journaliseraður, fyri at tryggja, at ein lættari kann gera sær eitt yvirlit í málinum.

*Skjaladagfesting*
Skjaladagfestingin hevur týdning fyri at kunna avgera, nær skjøl eru gjørd/móttikin. Dagfestingin verður ofta skrásett sjálvirkandi í skipanini. Áðrenn skipanin verður tikin í nýtslu, eigur myndugleikin at kanna, hvørjir teigar verða skrásettir sjálvirkandi í skipanini, og hvørjir skulu

tøppast inn manuelt. Tað er haraftrat av týdningi, at myndugleikin skilgreinar, hvat innihaldið í teimum ymisku dagfestingunum er.

*Skráseting av avsendara/móttakara*
Fyri inn- og útgangandi brøvum skal skrásetast avsendari/móttakari. Endamálið er, at leitast kann eftir skjølum upp á tvørs av málum, sum t.d. hava sama avsendara.

Myndugleikin skal í leiðreglunum lýsa, hvørjar upplýsingar skulu skrásetast um avsendara/móttakara. Landsskjalasavnið setir ikki krøv um, at tað skulu skrásetast ávísir upplýsingar um móttakara. Tað er t.d. ikki eitt krav, at postadressa skal skrásetast fyri móttakara. Tað er tó av týdningi, at myndugleikarnir áseta reglur fyri, hvussu móttakarar skrásetast og brúkast í skipanini, soleiðis at skrásetingin fer fram á sama hátt og stuðlar undir eini tryggari leitan.

*Goymsluháttur*
Goymsluhátturin er at avgera um eitt skjal skal goymast heilt ella partvíst talgilt í skipanini, um skjalið liggur í pappírslíki við síðuna av skipanini, ella at onki skjal hoyrir til skrásetingina. Endamálið við hesum skrásetingum er at gera klárt fyri framtíðar brúkarum av skipanini, at tað ikki eru hendir feilir í goymingini av skjølum, men at tað kann finnast aðrastaðni.

Størsti parturin av øllum skjølum, ið verða framleidd og móttikin á tí almenna økinum í dag, er talgilt. Skjøl frá borgarum t.d., verða skannað og goymd í teimum ymisku skipanunum. Tað kann tó framvegis koma fyri, at ein myndugleiki tekur ímóti einum pappírskjali, sum av einari ella aðrari orsøk ikki kann skannast og goymast í skipanini, t.d. stórar tekningar ella líknandi. Í hesum førum skal tað vera møguligt at skráseta í skipanini, at skjalið ikki finst í skipanini, men liggur á pappíri við síðuna av skipanini.

Eisini kunnu verða støður, har ein hevur brúk fyri at gera eina skráseting í skipanini, har tað ikki er knýtt eitt skjal til. Tað kunnu verða dømi, um so er at ein brúkar skjalaskrásetingarskipanina til notatir/skrivligar viðmerkingar, sum ein skrivar beinleiðis inn í skipanina. Her er tað av týdningi at skjalfesta, at tað ongantíð hevur verið ein skjalafílur knýttur at skrásetingini.

Fleiri skipanir hava eitt virkiføri til at skráseting av goymiformi. Í sambandi við skráseting av skjølum verður upplýst sum “defoult”, at skjalið er talgilt. Tað skal verða møguligt at broyta hesa skráseting til “pappír” ella “ikki týðandi”, tá tað ikki er áleikandi. Tað hevur týdning, at skrásetingin verður gjørd á skjalastøði/niveau, tá eitt mál kann hava fleiri skjøl við ymiskum goymsluhættum.

Tá framleidd verður ein skjalasavnsútgáva av skipanini, skal skrásetingin av goymsluháttinum kunna goymast á hesar hættir:

- Heilt ella lutvíst talgilt = 1
- Pappír = 2
- Ikki týðandi = 3

Nógvir myndugleikar taka ímóti ymiskum lutum sum partur av teirra málsviðgerð. Tað kann t.d. vera lampir ella heilivágur, sum skulu góðkennast. Í hesum førum verður viðhvørt tikin ein (tagild)

mynd av lutinum. Myndin verður síðani skannað ella løgd inn í skipanina sum skjalfestan fyri móttøku og til víðari viðgerð av málinum.

Landsskjalasavnið kann seta krav um, at analogt/samgilt ljóð, sjónband og myndir, sum verða móttikin sum málstilfar, skal talgildast og leggjast inn í skipanina við tilknýti til viðkomandi málið. Tað skal tí lýsast í leiðreglunum fyri skipanina, um so er, at tað eisini er analogt/samgilt tilfar í málsviðgerðini.

Talgilt málstilfar, sum t.d. liggur á DVD ella líknandi, skal leggjast inn í skipanina, um so er, at Landsskjalasavnið metir, at tað hevur varðveitingarvirði. Tað skal tískil lýsast í leiðreglunum, um so er, at  talgilt málstilfar, liggur uttanfyri skipanina.

**§ 25.**
**Í einari skipan, ið verður brúkt av fleiri myndugleikum, skal í máls- og skjalaskrásetingini síggjast, hvør myndugleiki tað er ið brúkar skipanina, sum er skrásett í málinum ella skjalinum.**

Í fleiri ráðharraøkjum verða brúkt felags ESDH/TMSH-skipan, har myndugleikarnir deila dátugrunnin og skrásetingarsystematik. Aðrastaðni verða skipanir brúktar, har fleiri myndugleikar journalisera í sama mál. Í báðum førum skal altíð vera møguligt at síggja, hvørjir myndugleikarnir hava stovnað málið/skjalið. Í skjalasavnsútgávum av skipanum, sum hava verið nýttar av fleiri myndugleikum, skal tað tí verða ein teigur, sum lýsir, hvørjir myndugleikar hava stovnað tað einstaka málið/skjalið. Upplýsingin skal gevast antin á málsstøði ella á skalastøði, alt eftir hvussu skipanin hevur verið brúkt.

**§ 26.**
**Myndugleikarnir skulu í sambandi við fráboðanina áseta hvørji fílasløg eru goymd í skipanini.**
Myndugleikin skal upplýsa Landsskjalasavnið um, hvørji fílasløg skulu goymast í skipanini. Endamálið er, at vit kunnu gera eina meting av um fílasløg sum eru í skipanini, sum kunnu geva trupulleikar í sambandi við konvertering/umskapan til eina skjalasavnsútgávu. Um so er, seta vit okkum í samband við myndugleikan fyri at tosa um, hvussu henda avbjóðingin ella trupuleikin kann loysast. Tey fílasløgini, sum eru partar av vanligum skrivstovupakkum so sum Microsoft Office-pakkin og pdf,  geva vanliga ikki geva trupulleikar í sambandi við konvertering.

*Dømi um trupuleikakend fílasløg*
Fílasløg, sum geva trupulleikar í sambandi við arkivering, kunnu vera:

- Dátugrunnafílur
- Forritafílur (exe-fílur)
- Pakkaðar fílur (zip-fílur)

Tað finnast ymiskir hættir at viðgera hesar fílar uppá. Til dømis kunnu dátugrunna-fílur arkiverast í einari sjálvstøðugari skjalasavnsútgávu, um so er, at tær innihalda varðveitingarverdar dátur. Meðan zip-fílur skulu pakkast út, áðrenn tær goymast í skipanini, og til seinast skulu exe-fílur als ikki goymast í skipanini.

Um so er, at myndugleikin er í iva, um eitt fílaslag kann formbroytast til skjalasavnsskap, kann samband takast upp við veitaran av skipanini. Tað er til eina og hvørja tíð myndugleikin, sum hevur ábyrgdina, at fílasløgini sum skulu goymast í skipanini, kunnu formbroytast til skjalasavnsskap ella eina skjalasavnsútgávu.

**§. 27.**
**Í skipanum við skjølum skulu vera søgulýsingar/historikkur á tabellunum við upplýsingum um mál og skjøl, sum í minsta lagi innihalda teir upplýsingar, sum ávíst í §§ 23-24.**
***Stk. 2.*** **Søgulýsingin/historikkurin skal kunna ganga inn í eina skjalasavnsútgávu.**

Tað skal verða møguligt at fylgja við hvørjar broytingar, ið henda í málum og skjølum, fyri at tryggja teirra trúvirði fyri eftirtíðina.

**§ 28. Fyri allar skipanir við varðveitingarverdum skjølum skal gerast ein leiðbeining við leiðreglum fyri røkjan av skjalasavnsfyrilitum í skipanini.**

**Stk.2. Vegleiðingin skal innihalda nágreiniliga frágreiðing um:**

1) **Endamálið við og innihaldið í skipanini, herundir samanhangin við aðrar skipanir hjá myndugleikanum**
2) **Vanligar mannagongdir og arbeiðsgongdir í skipanini hvat viðvíkur**
    - **Navngeving av málum og skjølum**
    - **Upprættan og afturlating av málum**
    - **Lýsing og brúk av skrásetingarkervisfrøði, herundir reglur fyri viðlíkahaldan av skrásetingini**
    - **Handfaring av varðaveitingarsniði, herundir goymslu av møguligum pappírskjølum v.m., sum eru skrásett, men ikki goymd, í skipanini**
    - **Loyvd fílusløg**
    - **Ljóslesing ella talgilding av analogum tilfari í skipanini**
    - **Skipanarbroytingar**
    - **Broytingar í málsøkjum**
    - **Avhendan til Landsskjalasavnið**
3) **Góðskutrygging av skrásetingum í skipanini og eftirlit við skrásetingarvanum.**
4) **Onnur viðurskifti, sum myndugleikin heldur hevur týdning fyri at tryggja gagnligari nýtslu av skipanini.**

Endamálið við leiðreglunum/instruksini er at seta karmar um mynduleikans nýtslu av skipanini. Tað skal vera “fasitlistin” fyri, hvussu myndugleikin kann tryggja, at skipanin verður brúkt uppá ein eins og góðan hátt í mun til egnan tørv. Halda krøvini frá Landsskjalasavninum og onnur lógarkrøv. Leiðbeiningin skal dagførast javnan, soleiðis at hon altíð er lagað til ta veruliga nýtsluna av skipanini.

Myndugleikin kann, við síðuna av leiðreglunum, hava brúk fyri at hava tøppingarvegleiðingar ella aðrar hættir fyri brúkaravegleiðingar, sum eru málrættaðir eftir ymiskum brúkarum av

skipanini. Vegleiðingarnar kunnu hála tær upplýsingar út úr leiðreglunum, ið hava týdning fyri júst tann brúkarabólkin.

*Innihaldið í leiðbeiningini*

Innihaldið í leiðbeiningini skal vera sum fylgjandi:

1. Endamálið við skipanini og møguligir samanhangur við aðrar skipanir hjá myndugleikanum

   Endamálslýsingin kann t.d. innihalda ávísing til ávísar lógir, stuðlað upp undir innanhýsis tørvi sum t.d. vitanardeiling og skjalafesting.

   Í lýsingini av samanhanginum við aðrar skipanir kann skrivast, hvørji mál skulu skrásetast í skipanini, og hvørji mál møguliga skulu liggja í øðrum skipanum. Um so er, at skipanin er ein partur av einum skipanarlandslagi, skal tað í leiðbeiningini eisini skrivast ein yvirordnað lýsing av øllum landslagnum.

2. Arbeiðsgongdir og praksis hjá myndugleikanum:
   - Upprætting og loking av málum
     Tað skal lýsast, nær eitt mál skal stovnast, og hvørji sløg/hættir/formar fyri málum myndugleikin brúkar. Tað kann t.d. vera ein borgari, ið vendir sær til myndugleikan, sum ger, at stovnað verður eitt mál. Ella setan av einum nýggjum starvsfólki, sum ger, at stovnast skal eitt "dossiermál", sum fylgir starvsfólkinum gjøgnum alla setanartíðina.

     Skilt verður ímillum fylgjandi hættir av málum:
     - Dossiermál, tvs. eitt mál pr. lut ella persón (td. starvsfólkamál)
     - Samlimál, tvs. eitt mál pr. evni (td. áheitan av einum ávísum slagi)
     - Stakmál, tvs. eitt mál pr. áheitan/hending/verkætlan (til dømis um eina ávísa hending.)

     Landsskjalasavnið mælir til, at myndugleikin mest møguligt brúkar stakmál, tá onnur málssløg skjótt verða trupul at fáa yvirlit yvir vegna ov stórar málsmongd, tó eru dossiermál ofta betri at brúka í samband við starvsfólkamál.

     Somuleiðis skal lýsast, nær eitt mál skal verða lokast, og hvør hevur ábyrgd av, at hettar hendir.

   - *Navngeving av málum og skjølum*
     Tað skal lýsast, hvussu eitt mál skal navngevast, og hvørjar metadátur skulu knýtast til tað. Tað kann, út yvir teir vanligu upplýsingarnar, t.d. vera málsslag, tíðarfreist og líknandi.

     Fyri skjøl skulu leiðreglur vera fyri, nær eitt skjal skal journaliserast/knýtast til eitt mál, somuleiðis hvussu tað skal navngevast í sambandi við journaliseringina.

- *Lýsing og brúk av skrásetingarsystematikki/kervi, herundir reglur fyri viðlíkahaldi*
  Tað skal lýsast, hvønn skrásetingarhátt myndugleikin brúkar, og hvussu hann skal brúkast. Tað kann t.d. vera ein lýsing av, hvussu nógvar fasettir/evnaorð eru kravdar til at knýta til eitt mál.

  Tað kann í einum tíðarbili verða tørvur fyri at gera uppískoyti til skrásetingarháttin ella strika fasettir, evnaorð ella málsbólkar. Tað er tó av týdningi, at tað er ásett, hvør hevur ábyrgdina av, at hátturin er dagførdur og at broytingarnar kunnu gerast. Broytingarnar skulu javnan skjalfestast í leiðreglunum.

- *Handfaring av goymisniðum ella skapum (formatum)*
  Tað skal verða ein leiðbeining til, hvussu man broytir goymsluhátt av skjølum í skipanum, og nær tað er neyðugt at gera hettar. Tað vil siga, hvussu ein skrásetur, at hetta ávísa skjalið einans er á pappíri, ella at tað als ikki er eitt skjal til knýtt til hesa skrásetingina.

  Ì leiðreglunum skal eisini vera ein lýsing av, nær og hvussu pappírskjøl, sum skulu skannast, skulu goymast. Tað verður viðmælt, at myndugleikin ger eitt lítið pappírasavn, har skjølini verða savnað, soleiðis at tað kann tryggjast, at tey kunnu finnast, tá er brúk fyri teimum, ella tá tey skulu avhendast til Landsskjalasavnið. Pappírssavnindi skulu avhendast til Landsskjalasavnið aftan á áleið 30 árum, um tey ikki verða brúkt í fyrisitingini longur.

- *Loyvd fílusløg*
  Leiðreglurnar skulu innihalda ein lista yvir fílusløg, sum eru loyvd í skipanini. Haraftrat skal vera ein vegleiðing um, hvussu gerast skal, um so er at tikið verður ímóti einum fíluslagi, sum ikki beinleiðis kann goymast í skipanini. T.d. kann ásetast ein regla um, at pakkaðar fílur (zip-fílur) altíð skulu pakkast út, áðrenn tær verða lagdar í skipanina, og at e-postur við viðheftum fílum í ókendum fíluslagi verður sendur aftur til avsendaran við boðum um at endursenda við vanligum fíluslagi.

- *Skanning ella talgilding av samgildum/analogum tilfari*
  Lýsingin skal bert verða partur av leiðreglunum, um so er, at tað verður aktuelt í arkivtíðini.

  Skjøl, sum verða móttikin á pappíri, skulu skannast í skipanina. Leiðreglurnar skulu tískil innihalda eina arbeiðsgongd fyri, hvussu tað verður tryggjað, at øll týðandi skjøl verða skannað í skipanina.

  Um so er, at myndugleikin ynskir at skanna mál frá eldri journaltíðarskeiðum í skipanina, skal tað fráboðast Landsskjalasavninum, áðrenn skanningin byrjar. Tað geldur tó bert, um so er, at ætlanin er at burturbeina varðveitingarverd mál, eftir at tey eru skannað.

*Skipanarkonvertering/formbroyting*
Lýsingin skal vera partur av leiðreglunum, um so er, at tað verður átrokandi í arkiveringstíðaskeiðinum.
Um so er, at myndugleikin skiftir skipan millum tvær arkiveringar, skal formbroytingin deils fráboðast til og góðkennast av Landsskjalasavninum, deils skal tað í leiðreglunum lýsast, at tað er gjørd ein formbroyting.

*Ábyrgdarbroytingar/ressortbroytingar*
Lýsingin av ábyrgarbroytingini skal bara vera í leiðreglunum, um tað er aktuelt í sambandi við arkivtíðarskeiðið.

Àbyrgdarligar broytingar, sum hava týdning fyri nýtsluna av skipanini, skulu fráboðast til Landsskjalasavnið. Samstundis skal tað lýsast í leiðreglunum, hvussu broytingarnar handfarast. Tað kann t.d. vera, at tað í skrásetingar-systematikkinum skulu nýggj evni/málsbólkar til, um so er, myndugleikin fær nýggj ábyrgdarøki, ella hinvegin at mál verða lokað v.m. um so er, at eitt mál flytur til ein annan myndugleika.

*Avhending til Landsskjalasavnið*
Tað skal tilskilast í leiðreglunum, at tað skal gerast avhending av einari skjalsavnsútgávu av skipanini eftir reglunum hjá Landsskjalasavninum. Haraftrat skal tilskilast, eftir hvørjum myndli/hætti skipanin ynskist at blíva arkiverað í. (tíðarskifti, løtumynd ella lokað mál). Hátturin verður endaliga ásettur eftir endað eftirlit.

Haraftrat skal tilskilast, um loyvi er givið til vraking av málum og skjølum í skipanini.

3. Lýsing av góðsku og eftirlit við skrásetingarsystematikki

Leiðreglurnar skulu innihalda lýsing av, hvussu myndugleikarnir tryggja eina einsháttaða og nøktandi skráseting í skipanini. Við “nøktandi” meinast, at tað í minsta lagi verða skrásettir tær upplýsingar um mál og skjøl, sum eru sbrt. hesum rundskrivi. Haraftrat skal myndug-leikin føra eftirlit við, hvørji fílusløg verða goymd í skipanini.

Lýsingin skal vísa á, hvørji tiltøk myndugleikin setur í verk fyri at tryggja góðskuna í skipanini.

Tryggingin av góðsku í skrásetingunum kann antin gerast við góðskutrygging í sjálvari skipanini t.d. við nýtslu av “worksflows”, sum stuðla uppundir, at ávísar upplýsingar um mál og skjøl verða skrásett, ella við handaligari góðskutrygging, t.d. við at gjøgnumganga mál í sambandi við loking av málum ella “skreening” upp á tvørs av málum.

Góðskutrygging umfatar eisini eftirlit av, at skjøl, ið eiga at verða journaliseraði eisini verða sett inn í skipanina.

4. Onnur viðurskifti, sum myndugleikin heldur verða neyðug fyri at tryggja eina fyrimyndarliga nýtslu av skipanini.

   Omanfyri nevndu punkt eru viðurskifti, sum skulu lýsast fyri at tryggja uppgávuna viðvíkjandi skjalasavnindaatlitum. Fleiri av hesum atlitum er samanfallandi við tørvin hjá myndugleikunum at skráseta, stýra og góðskutryggja mál og skjøl. Harumframt kunnu tað tó vera umstøður, sum eru serligar fyri økið hjá tí einstaka myndugleikanum. Tað kunnu t.d. vera serstakar upplýsingar um mál og skjøl, lýsing av arbeiðsgongdum ella innlitsloynimál, ið tørvur er á at skriva í leiðreglurnar fyri skipanina.

## Eftirlit og umsjón við góðkendum skipanum og skjølum

**§ 29.**

**Myndugleikarnir skulu fremja eftirlit við, um kravdu upplýsingarnar s.brt. §§ 23–24, eru skrásettar rætt.**

***Stk. 2.* Eftirlitið skal vera lýst í ásetingum hjá myndugleikanum um nýtslu av skipanini sbrt. § 28**

Myndugleikin skal javnan kanna eftir, um tær kravdu upplýsingarnar um mál og skjøl eru skrásettar í skipanini. Tað skal verða lýst í leiðreglunum, hvussu hettar eftirlitið skal fara fram. Tað kann til dømis gerast við at taka útskriftir úr skipanini og við stakroynd av málum. Fyri skjøl kann eftirlitið millum annað gerast við úrtøku av skjølum, ið ikki eru knýtt einum máli.

**§ 30.**
**Myndugleikin skal fremja eftirlit við um skrásett eru onnur fílusløg í skipanini, enn tey, sum ávíst í leiðbeiningini, sbrt. § 28.**
Myndugleikin skal javnan hava eftirlit við, hvørji fílusløg eru í skipanini, og sum samsvara við listan um fílusløg í leiðreglunum. Eftirlitið kann gerast við at gera dátuúrtøku frá skipanini, sum vísur, hvørjir fílasløg finnast í skipanini. Um so er, at myndugleikin finnur fílusløg, sum ikki eru á listanum í leiðreglunum, skal kannast nærri, hví fílurnar eru lagdar inn, og um tað eru sakligar grundir til at goyma fíluslagið. Um tað er so, og um so er, at fíluslagið kann formbroytast til eitt skjalasavnsnið, kann hon beinleiðis koyrast til listan. Um hetta ikki ber til, skal myndugleikin syrgja fyri, at fílan verður formbroytt til eitt annað snið, soleiðis at hon verður partur av skjalasavns-útgávuni.

**§ 31.**
**Landsskjalasavnið hevur eftirlit við nýtsluni av skipanum við skjølum, sum skulu goymast. Eftirlitið verður framt umleið 2 ár eftir at skipanin er tikin í nýtslu.**

**Stk. 2. Eftirlitið snýr seg um kanning av, um skipanin verður nýtt, sum lýst í leiðbeiningini, herundir um myndugleikin hevur gjørt tað rætta eftirlitið, sbrt §§ 29 - 30.**

Tær seinastu 10 ára royndirnar við arkivering av skipanum við skjølum hava víst, at trupulleikar kunnu vera bæði við góðskuni av skrásetingum og skjølum eins og við formbroyting til skjalasavnsútgávusnið og eisini við skjalfestanini av broytingum í “livitíðini” hjá skipanini.

Landsskjalasavnið fremur tískil eitt eftirlit við nýtsluni av skipanini, tá hon hevur koyrt áleið 2 ár, fyri at fyribyrgja, at tað vera størri trupulleikar tá skipanin skal avhendast. Endamálið við eftirlitinum er at kanna, um myndugleikin fylgir lýsingini, sum er lýst í leiðreglunum, eins og at avgera hvørjum avhendingarleisti/frymli skipanin skal avhendast eftir. Landsskjalasavnið kann, sum avleiðingin av eftirlitinum, áleggja myndugleikanum at rætta feilir og manglar.

Somuleiðis kannar Landsskjalasavnið, um myndugleikin hevur ta skjalfestanina av skipanini, sum skal fylgja við skjalasavnsútgávuni.

***Gildiskoma***

**§ 32. Rundskivið kemur í gildi xx.xx.201x**

***Landsskjalasavnið, tann xx.xxx.101x***